# Heilsumálaráðið

**Lógartænastan**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 25. september 2020 |
| Mál nr.: | 20/00787-2 |
| Málsviðgjørt: | RM/EIK |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Kunngerð um ískoyti til gjald fyri veiting hjá privatstarvandi fysioterapeuti**

Við heimild í § 8, stk. 4 í løgtingslóg nr. 178 frá 22. desember 2009 um almenna heilsutrygd, sum broytt við løgtingslóg nr. 36 frá 30. apríl 2018, verður ásett:

**§ 1.** Heilsutrygd kann rinda ískoyti til veiting frá privatstarvandi fysioterapeuti, eftir ávísing frá serlækna, sum starvast í føroyska sjúkrahúsverkinum ella í kommunulæknaskipanini.

*Stk. 2.* Er talan um persón yngri enn 18 ár, sum hevur likamligt brek ella varandi sjúku, ið hevur við sær munandi avleiðingar í gerandisdegnum, kann serlækni í pædiatri ávísa til fleiri viðgerðir, enn sambært sáttmálanum millum Fysioterapeutfelag Føroya og Fíggjarmálaráðið annars, tó í mesta lagi 2 viðgerðir um vikuna. Tílík ávísing kann útskrivast fyri 2 ár í senn.

**§ 2.** Fysioterapeutisk veiting skal verða veitt samsvarandi treytunum, sum eru ásettar í sáttmála millum Fysioterapeutfelag Føroya og Fíggjarmálaráðið.

**§ 3.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Heilsumálaráðið, xx. September 2020

**Kaj Leo Holm Johannesen**
landsstýrismaður

/ Turid Arge